Skemt



# Nú verður lag á manni

Arbeiðið at leingja flogvøllin er í gongd, og tað verða eftir øllum at døma stórar broytingar, tá ið Vága floghavn hevur fingið nakrar hundrað metrar av flogbreyt afturat. Forkvinnan í Vága Floghavn skrivar í øllum førum soleiðis í vikuni: »Ferðavinnan er eisini ein vinna, sum vit eiga at satsa uppá. Tá flogvøllurin verður longdur og flúgvast kann beinleiðis til fjarskotin lond, verða møguleikar eisini latnir upp fyri at fleiri ferðafólk koma at vitja oyggjarnar.« Og vit, sum hildu, at tað bar til at flúgva út í heim, sum nú er, og at fáa fáa ferðafólk hendanvegin!

## Gongur harðliga fyri seg

**Suðuroyingar duga at taka til – eisini um tað onkuntíð skal verða eitt sindur ógvusligt. Okkara góði kollegi í Sandvík spardi seg ikki, tá ið hann í vikuni skrivaði um rottangar í Vági: »Vágbingar fáa knívin á barkan«, »annars fellur hamarin«. Ja, bæði knívar og hamarar vóru drignir upp í eitt mál um rottangar...**




## Nummarpláta fyri seg – ella meg

Tað ber til at keypa sær sína egnu persónligu nummarplátu á bilin. Tað eru fleiri, sum hava brúkt tann møguleikan, og hava eitt persónsnavn ella firmanavn á nummarplátuni. Her er ein bilur, ger tað stutt og greitt á nummarplátuni!

## Í RANGASTRÚPAN

**Søguligur spaki!**
Annika setir søguligan spaka í
*Portal.fo*

**Rudda forsíðuna!**
Mín jólabók er gul í ár
*Dimma*

**Nýtt høvuðssæti?**
Eik eigur nú Sjómansheimið í Runavík
*Kringvarp.fo*

**Onnur flenna at Berlusconi**
Berlusconi flennir í kíki at WikiLeaks
*Dimma*

**Var hann burturblivin?**
FC Suðuroy hevur funnið venjaran
*Portal.fo*

**Bensin í hylinum?**
Eldur í svimjihylinum í Kollafirði
*Sosialurin*

**Tey standa saman í Miðeystri**
Saudiarabia vildi hava
USA at leypa á Iran
*Kringvarp.fo*

**Yes we can!**
Barack Obama vil hava
lønarsteðg hjá tí almenna
*Kringvarp.fo*

**Hvussu letur tað seg gera?**
Runavíkar havn í Cannes
*Portal.fo*

**Kundi ikki verið nógv verri**
Norðurkorea hevur ein vin í verðini
*Dimma*

## UMAFTURAFTURUM
### HØGNI DJURHUUS



# The hair of the dog

Latið okkum eina løtu her fyrst í advent venda aftur til veruleikan, til okkurt hugaligari enn politikk, fakfeløg, fólkaræði, bankar og danskarar.

Vit fara í vertshús. Ektað vertshús við fólkum, sum drukku seg full eina ferðina fyri nógvum árum síðani. Høvdu eina stíva kenning og javnaðu, tá tey raknaðu við aftur eftir døgurða dagin eftir. Og javna enn í vertshúsum. Nøkur eru flutt inn med alla. Onnur í nakrar vikur ella mánaðir.

Ársfjórðingsdrykkjumenn, sum ikki høvdu stundir ella motivasjón ella bara ikki tímdu at fara úr skrivstovuuniforminum, áðrenn teir løgdu í vaðið. Men har, sum teir leitaðu sær vað, er ov djúpt. Nú er ljósabláa skjúrtan flekkut, gráu buksurnar fánaðar nakað, og slipsaknúturin liggur bundin í litfarna jakkalummanum.

Skemtarin og fyrrverandi MF, Jacob Haugaard, sigur, at hann fór í ball, tá hann var 17, og so var hann heima aftur fyri at skifta, tá hann var 28.

Í vertshúsum tosa fólk. Tey tosa nógv, tey tosa hart, og tey vita væl.

Í góðum vertshúsum er eisini altíð onkur góð søga.

Minnist beint nú eina, sum eg hoyrdi í einum vertshúsi í Tromsø. Barrvørðurin, Motörheadfjeppari í svørtum klæðum og Lemmyhári og motherfuckerskeggi, skilamaður. Hann visti at siga um ein óvanliga kaldan vetur norðast í Norra, norðan fyri Tromsø. Hetta frættist so suðureftir, heilt suður til Oslo. Kuldin var øgiligur, segðist, minus 42 stig.

Hetta hildu tey á einum høvuðstaðareinglapressublaði vera eina góða søgu, 42 stiga frost í Norra. Beint á forsíðuna við henni. Ein journalistur hugdi í telefonbókina, tók eitt tilvildarligt nummar og ringdi til ein mann har norðuri ígjøgnum í myrkrinum.

Segði, hvør hann var, og spurdi, hvussu kalt er í dag?

»Jú, bíða við, eg skal fara at hyggja...«

»Minus 24 stig.«

»Bara 24 stig?« spurdi vónbrotni verjin hjá fólkaræðinum. »Her í Oslo hava vit hoyrt um minus 42 stig.«

»Á, tú meinar, hvussu kalt, tað er úti...?«

Tey eru mælsk á vertshúsum. Ársfjórðingarnar tosa um politikk og skaldsskap, duga heilar yrkingar uttanat. Biðja onnur halda kjaft og ætla sær ikki til arbeiðis aftur fyribils.

Tey eru allastaðni har úti í framkomna heiminum, og her hjá okkum eisini, vertshúsini hjá teimum, sum tøma fløskurnar og gløsini og stoyta ikki helvtina í vaskið. Hjá teimum er glasið ongantíð hálvtfult, men altíð hálvtømt – í ein minutt Tey hava, ólíkt so nógvum øðrum, eitt endamál við lívinum, næsti javnarin. Og tey halda á, so leingi lív og heilsa eru og Gud vil.

At javna gevur bestu kenningina. Viðlíkahald og umvæling í senn, uttan timburmenn.

Og allur annar rúsur er forboðin og revsiverdur, uttan tann gudiligi sjálvandi. Tað er ikki revsivert at religiøsa seg upp um gleðiboðskapin.

Einki er tó sum at vakna í kirkjutíð hjá teimum kirkjum, sum hava gudstænastu á middegi. Berja seg úr songini, finna »Tarkus« og leggja orgulsjampanjuna hjá Emerson, Lake og Palmer á plátuspælaran, skrúva upp. Og javna. Ikki við kirkjuvíni.

Seytjan ferðir til helvitis, sum maðurin segði, áðrenn hann fekk snarað proppin av vodkafløskuni og drukkið dagsins fyrsta javnara.

Bretar siga tað so væl: the hair of the dog, that bit you.